# Helgi er norðurlandameistari

**Framgongdin tykist ongan enda fáa hjá Helga Dam Ziska. Sunnudagin vann hann NM í bólkinum hjá teimum, sum eru fødd í 1989-1990.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Helgi Dam Ziska staðfesti enn einaferð bjørtu framtíðarútlitini, tá hann vann NM-heitið fyri telvarar í næst elsta bólkinum í NM-kappingini*



*Eisini aðrir føroyingar fingu góð úrslit. Ikki minst Olaf Berg, sum megnaði at fáa bronsumerki í elsta bólkinum*

15 ára gamli havnarmaðurin Helgi Dam Ziska skrivaði føroyska søgu, tá hann sum tann fyrsti føroyingurin varð norðurlandameistari í talvi. Áhugavert hevði verið at kanna, um hetta eisini er galdandi í øllum øðrum ítróttum. Hava vit nakrantíð havt ein legitiman norðurlandameistara í nakrari ítróttargrein?

Í øllum førum framdi Helgi eitt satt bragd, tá hann í harðari kapping við serliga svian Erik Blomquist og norðmannin Jon Ludvig Hammer dró rætta stráið í NM, sum varð telvað í Finnlandi.

### Sterk telving – gott heimaarbeiði

Fyrireiking er lyklaorðið. Helgi er ein sera nærlagdur telvari og hetta kom av álvara til sjóndar í fleiri av talvum hansara í Finnlandi. Eitt nú nýtti Helgi undir 15 minuttir til ein av sínum sigrum. Og hetta talvið vardi yvir 20 leikir. Alt var fyrireikað áðrenn talvið fór í gongd. Jú, tað hendir seg mangan, at ein ikki rakar júst sína egnu fyrireiking við tað, at mótstøðumaðurin telvar okkurt óvæntað, men Helgi rakti seymin beint á høvdið fleiri ferðir.

Helgi vann trý talv og leikti tríggir javnleikir. Hann var styrkismettur næstovastur av teimum fjúrtan luttakarunum, sum vóru í hvørjum aldursbólki. Tað var tí ikki óvæntað at Helgi var í oddastríðnum alla kappingina.

Tað er bert ein javngamal telvari í norðurlondum, sum av røttum kann kalla seg sterkari enn Helgi. Heimskendi norski stórmeistarin, Magnus Carlsen, átti av røttum at luttikið í hesum sama bólki (Hann er eins og Helgi føddur í 1990), men hann er sum kunnugt alt ov sterkur. Hann er beint undir heimselituni við sínum nærum 2650 ratingtali.

Føroyingar hava veruliga gjørt um seg á altjóða pallinum seinastu vikurnar. John Arni fekk sín triðja og avgerandi IM-norm herfyri og Helgi er norðurlandameistari. Vit eru fá, men sanniliga ment at vera við í norðurlendska toppinum.

### Olaf enn eina bronsu

Olaf Berg hevur luttikið í sínum seinasta NM fyri unglingar. Ein kann nevnliga ikki verið eldri enn 20 ár fyri at luttaka í NM fyri ung. Olaf hevur síðani 1997 umboðað Føroyar á hvørjum ári og altíð við góðum úrslitum. Fleiri ferðir hevur hann ognað sær bronsu og oftani hevur hann luktað gullið. Eitt sterkt føroyskt umboð úti í heimi.

Í ár tyktist tað at verða ein off-kapping hjá honum, tá hann eftir fyrstu tvey umførini einki stig hevði. Men fýra góðir sigrar á rað góvu honum enn eitt flott triðja pláss. Olaf var styrkismettur nummar átta, so talan er um eitt framúr úrslit eisini hjá honum.

### Heildarsuccess

Talvsamband Føroya sendi tíggju telvarar avstað til Finnlands. TSF-bossurin, Jógvan Joensen, var ferðaleiðari og saman við honum var Martin Poulsen við sum venjari. Eisini fóru fleiri foreldur teinin til Finnlands at stuðla børnunum.

TSF hevði gjørt eitt dygdargott undanarbeiðið við eitt nú venjingarlegu. Ungu telvararnir kenna seg væl, fáa virðing og góða hjálp frá TSF. Umstøðurnar at vera ungur telvari í Føroyum nú á døgum eru frálíkar.

Sum held gekk tað væl hjá føroysku telvarunum í Finnlandi. Eitt nú fingu Heiðrikkur Jacobsen (1991-1992) og Høgni E. Nielsen (1995 og yngri) trý stig og endaðu mitt í røðini.

## NM 2006

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Bólkur A (1986-88)** | | | |
| 1 | Kezli Ong | SWE | 5.5 |
| 2 | Jacob Vang Glud | DEN | 5.0 |
| 3 | Olaf Berg | FAI | 4.0 |
| 14 | Sjúrður Thorsteinsson | FAI | 1,0 |
| **Bólkur B (1989-90)** | | | |
| 1 | Helgi Dam Ziska | FAI | 4,5 |
| 2 | Jon L. Hammer | NOK | 4,0 |
| 3 | Erik Blomqvuist | SWE | 4,0 |
| 13 | Rógvi Dragaberg | FAI | 1,5 |
| **Bólkur C (1991-92)** | | | |
| 1 | Alexei C. Hansen | DEN | 5,0 |
| 13 | Hjalti T. Jógvansson | FAI | 1,5 |
| 14 | Rógvi E. Nielsen | FAI | 1,0 |
| **Bólkur D (1993-94)** | | | |
| 1 | Hjørvar S. Gretarsson | ISL | 5,0 |
| 8 | Heiðrikkur Jacobsen | FAI | 3,0 |
| 14 | Jóhan Vørmadal | FAI | 0,0 |
| **Bólkur E (1995 - )** | | | |
| 1 | Mads Andersen | DEN | 5,5 |
| 9 | Høgni E. Nielsen | FAI | 3,0 |
| 13 | Jóhan Hentze | FAI | 1,5 |

## Talvið hesa vikuna

**Helgi Dam Ziska (2218) – Eric Malmi (2008)**
NM 2006 Espoo, Finland, 2006

Longu í fyrsta umfari legði føroyski norðurlandameistarin lunnar undir eitt megnarúrslit, tá hann nýtti undir tjúgu leikir at syfta finska mótstøðumann úr stólinum.

**1.e4 c6 2.d4 d5 3.f3** í FM-liðkappingini royndi Helgi seg við júst somu byrjan ímóti Finnbjørn Zacharissen. Helgi vann tá eins og her sannførandi. **3...dxe4 4.fxe4 e5 5.Rif3 Rif6 6.Bc4 exd4 7.0-0 Be6 8.Bxe6 fxe6 9.e5 Rifd7?** (Rie4 og síðani Fd5 sær okey út hjá svørtum) **10.Rig5 Rixe5 11.Rixe6 Fd6 12.Fh5+ g6 13.Fh3 Ribd7 14.Rid2 Ric5 15.Rixc5** Helgi finnur sjálvsagt rætta háttin at vinna sum skjótast **15...Fxc5 16.Rie4 Fe7 17.Bg5 Fc7**




**Støðumynd eftir 17…Fc7**

**18.Rif6+** Og svartur gavst orsakað av: 18…Kd8 19. Rig8+ Ke8 20. Fe6+ **1-0**

# Fimleikararnir spentu seg út

**Í vikuskiftinum var seinasta steypakappingin í amboðsfimleiki á hesum sinni. Kappingin var í fimleikahøllini í Glyvra Skúla, og hesaferð kappaðust fimleikararnir í ringunum og á bitanum**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hava steypakappingar í amboðsfimleiki verið á skránni. Tann síðsta kappingin á hesum sinni var leygardagin í fimleikahøllini í Glyvra Skúla; hesaferð var Fimleikafelagið Støkk vertur. Nógv fólk høvdu leitað sær í fimleikahøllina at síggja teir umleið 20 fimleikarar frá Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósinum kappast.

Eins og til undanfarnu steypakappingarnar, vóru fimleikararnir býttir í fýra bólkar; kvinnur, kvinnuunglingar, menn og mansunglingar. Kvinnurnar og kvinnuunglingarnir kappaðust á bitanum, har javnvág hevur sera stóran týdning; bitin, sum tær íðka á, er ikki meira enn umleið 10 cm breiður. Menninir og mansunglingarnir kappaðust í ringunum, har sera høg krøv verða sett til styrki í ørmunum.

Kappingin gekk væl, og nevndin í Føroya Fimleikasambandi, sum hevur tikið stig til hesar kappingarnar, er sera væl nøgd við úrslitini. Tað vísir seg, at fleiri kappingarnar eru, betri verða fimleikararnir, og skjótari mennast teir.

Næsta avbjóðingin hjá teimum vaksnu amboðsfimleikarunum, t.v.s. kvinnunum og monnunum, er kappingin um norðurlendska meistaraskapin, sum verður í Íslandi í apríl.



*Rósing Dam í ringunum. Rósing vann kappingina hjá monnunum.*

## FAKTA

### Úrslitini í steypakappingini

**Kvinnur:**

| *Nr* | *Navn* | *stig* |
|---|---|---|
| 1 | Anita Knudsen, Støkk | 7,65 |
| 2 | Elinborg T. Durhuus, Ljósið | 6,70 |
| 3 | Fríðhild Norðgerð, Støkk | 6,20 |

**Kvinnuunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Natasha Barbara Olsen, Ljósið | 7,70 |
| 2 | Kristina Toftegaard, Støkk | 7,60 |
| 3 | Silja Højgaard, Støkk | 7,10 |

**Menn:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rósing Dam, HF | 7,60 |
| 2 | Øssur D. Eiriksfoss, HF | 7,40 |
| 3 | Fróði Mortensen, HF | 7,20 |

**Mansunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jóni B. Christiansen, HF | 7,15 |
| 2 | Kári Carlsen, Støkk | 6,95 |
| 3 | Olivur D. Eiriksfoss, HF | 6,80 |